# Vilt tú leiða framskygda EL-Risan í Tórshavn!

Sum leiðari hevur tú yvirskipaðu ábyrgdina av vøruhúsi okkara í Tórshavn. Tú ert skipaður, framburðarfúsur og eitt arbeiðsgrev, sum brennir fyri at fáa nøgdar starvsfelagar og nøgd viðskiftafólk.

**Vit sóknast eftir einum leiðara sum:**
- Ynskir at sigra
- Vil síggja úrslit
- Dámar at arbeiða við fólki og er tilvitaður um sína ábyrgd

**Arbeiðiðsuppgávur:**
- Dagligur rakstur av handlinum
- Leiða, menna og varveita starvsfelagar
- Ábyrgd av kostnaðarmeting, úrslitum og frágreiðingarskyldu
- Leggja til rættis og fremja marknaðarátøk

**Førleikar:**
- Royndir innan leiðslu - gjarna í somu vinnu, men tað er ikki eitt krav
- Fíggjarligt skynsemi
- Málrættaður, skipaður og sjálvstøðugur
- Viðskifta- og starvsfólkakunnaður
- Tú mást vera framasøkin

**Vit bjóða:**
- Kappingarførar treytir
- Góðar starvsfólkaskipanir
- Eitt spennandi leiðarastarv í einum í marknaði við menning

*At arbeiða í Elding merkir, at tú kemur at arbeiða í stóru handilsketuni El-Giganten, har tað alla tíðina fara fram broytingar, sum lata upp fyri møguleikum hjá teimum røttu fólkunum. Fyri okkum hevur tað størri týdning, hvør tú ert, heldur enn hvørja útbúgving tú hevur. Hevur tú teir røttu persónligu eginleikararnar og vilt vera við at betra okkara konsept, sum er ment ígjøgnum fleiri ár, kanst tú koma langt hjá okkum. Vit leggja dent á holla upplæring og bjóða kappingarføra løn í einum kveikjandi og inspirerandi umhvørvi.*

**Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:**
Mads A. Winther á telefon 216230

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. nov. 2005 og sendast til:**

Elding Tórshavn
Att. Mads A. Winther
Boks 1289
FO 110 Tórshavn

EL GIGANTEN
ELDING

ELDING Í SMS - BOKS 1289 - FO 110 TÓRSHAVN - TEL 319697


Í trotabúnum P/f Samvinnufelagið, FO-360 Sandavágur, reg. nr. P/f 28, sks. nr. A-34/2005, verður einhvør, ið hevur krøv biðin um, skrivliga at venda sær til bústjóra, advokat Óla Jákup Kristoffersen, Advokatskrivstovan, Fr. Petersensgøta 9, 100 Tórshavn, innan 8 vikur eftir at hetta er kunngjørt, og boða frá hesum krøvum, uppgjørd við møguligum rentum á trotadegnum tann 21. september 2005.

Skjalprógvan fyri krøvunum og makaskjal av fráboðanini skulu sendast við.

Tað verður innkallað til skiftifund týsdagin tann 10. januar 2006, kl. 9.30, í skiftirættunum, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, at royna fráboðaði krøv og møgulig onnur krøv. Ein listi við krøvunum og við tilmælum bústjórans og fráboðanum liggja til eftirskoðan í skiftirættinum 2 vikur innan skiftifundin.

**Føroya Skiftirættur**
tann 23. oktober 2005

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2292,**
P/F Bilasølan v/Øssur Johannesen, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
25.08.2005
**Nýtt navn:** P/F Bilasølan

*Skráseting Føroya*
*tann 21. oktober 2005*

*Kristin Balle*





NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM

## Starvið sum "tekniskur hjálpari/húsavørður" í Norðurlandahúsinum

**Starvslýsing fyri "tekniskur hjálpari/húsavørður":**

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar eru fyrireikingar av stóra salinum í Norðurlandahúsinum, og ljóð- og ljósarbeiði. Umframt hetta eru uppgávur sum vanliga eru knýttar at húsavørðsarbeiði.

**Vit ynskja at viðkomandi er:**
- ábyrgdarfull/ur, sjálvstøðug/ur, røkin, fyrikomandi og tænastuvinarlig/ur
- kann arbeiða undir trýsti og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum.
- klárar seg í føroyskum, enskum og í minsta lagi einum norðurlendskum høvuðsmáli í skrift og talu.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur útbúgving ella arbeiðsroyndir frá líknandi arbeiði. Teldukunnleiki er ein fyrimunir.

**Løn og setanartreytir:**
Sambært reglum fyri stovnar undir "Nordisk Ministerråd".
Annars eftir sáttmálanum millum "Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið".
**Setanartíð og vaktir:**
Talan er um fulltíðarstarv.
Setanartíðin er 4 ár , við møguleika fyri longdari starvstíð tó í mesta lagi 8 ár íalt.
Arbeitt verður í vaktarskifti og 4. hvørt vikuskifti. Tann ið verður settur, fær neyðuga upplæring innan alt øki.
Ynskiligt er at viðkomandi kann byrja í seinasta lagi 1. januar 2006

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:
**Norðurlandahúsið**
**Postboks 1250**
**110 Tórshavn**
og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi, mánadagin 7. november 2005. Merkið brævbjálvan " Tekniskur hjálpari/húsavørður"

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til stjóran í Norðurlandahúsinum, Niels Halm, telefon 317900. E.postur: niels@nlh.fo

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**



# Tit ringja - vit syngja!








Til Vistarheimið á Fugloyarvegi 1, sum er heim fyri yngri brekað, verður søkt eftir einum

# hjálparfólki

til at arbeiða í dagvakt frá kl. 8 til 16 aðru hvørja viku.

Løn sum sjúkrahjálparar uttan útbúgving.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Vistarheimið**
Fugloyarvegur 1
100 Tórshavn

**Fyri Vistarheimið**
Karolina Petersen


i Sosialurin